## Jóannes Eidesgaard innlagdur

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, varð seinnapartin í gjár lagdur inn á Landssjúkrahúsið. Eftir at hava hildið tíðindafund um ta nýggju fíggjarlógina kendi fyrrverandi løgmaður seg illa, og hann ætlaði sær til lækna. Sum skilst hevði hann pínu fyri bringuni, og hann bleiv innlagdur á Landssjúkrahúsið til kanningar. Vit hava frætt, at hjartað hevur tað gott, men fyrrverandi løgmaður hevur helst strongd av onkrum slag. Jóannes Eidesgaard hevur tað eftir umstøðunum gott, men hann skal til gjøllari kanningar á Landssjúkrahúsinum í morgun. Tað er ikki greitt, nær fíggjarmálaráðharrin verður útskrivaður. Hann hevði ongar viðmerkingar, tá vit tosaðu við hann í morgun.



# ALS skal virka fyri sjófólk eisini

**Nýggi vinnumálaráðharrin, Johan Dahl, fer at hava fund við ALS til tess at tryggja, at skipanin eisini skal virka fyri sjófólk**

AL-SKIPAN

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi verið stór ónøgd millum sjófólk við AL-skipanini. Ført verður fram, at sjófólk bara gjalda inn í skipanina, men fáa einki úr henni.

Sum skipanin virkar í dag, mugu sjófólk sigast upp, skulu tey sleppa inn í skipanina. Hetta merkir, at tá skip fara á beding ella fáa maskinskaða og harvið liggja í ein mánað ella meir, so merkir tað fyri manningina, at hon fær einki oyra frá ALS.

Tað sigur seg sjálvt, at tað ber illa til hjá reiðarínum at siga manningini upp, fyri at hon skal fáa útgjald frá ALS. Tí við einari uppsøgn fylgir eisini, at manningin harvið er tøk á arbeiðsmarknaðinum, og kann tí í prinsippinum krevjast í annað starv av ALS.



*Johan Dahl, vinnumálaráðharri, fer nú undir at endurskoða AL-skipanina við serligum atliti til sjófólk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Øll skipanin skal endurskoðast, men tað er serliga spurningurin um sjófólk, sum greiða má fáast á, og tí fara vit at taka ein fund við ALS fyri at bera so í bandi, at skipanin eisini fer at virka fyri sjófólk, sigur Johan Dahl, vinnumálaráðharri.

FAS-skipanin liggur eisini undir Vinnumálaráðnum, og har hevur samgongan sett sær fyri, at fáa skipanina at virka soleiðis, at hon verður áhugaverd fyri útlendsk reiðaríir.

- Vit mugu fáa FAS-skipanina marknaðarførda á ein skilagóðan hátt, so hon kann gerast enn eitt bein hjá okkum at standa á, segði Johan Dahl við Rás2, tá hann var tilnevndur vinnumálaráðharri.

Men júst henda skipan er ein trupulleiki við atliti til ALS, sum ein loysn má finnast á.

- Vit verða noyddir at finna fram til, hvussu gerast skal við tey sjófólk sum sigla við skipum, ið eru skrásett undir FAS. Skulu tey verða umfatað av AL-skipanini ella ikki, sigur Johan Dahl.

### Spurningur um FAS

Tað er ein einki at ivast í, at verður rætt skipað fyri, so kann ein vælvirkandi FAS-skipan skapa nýggjar inntøkur til landið, og tað var júst hetta, nýggi fíggjarmálaráðharrin eftirlýsti, tá hann legði fíggjarlógaruppskotið fram á løgtingi og á tíðindafundi í gjár.

FAS-skipanin varð sett á stovn í 1992, meðan John Petersen var fiskimálaráðharri, og landsstýrið tá hevði stórar ætlanir við skipanini. Hon er kortini ongantíð farin at virka sum ætlað, og tey nógvu skipini eru ongantíð skrásett undir FAS. Í dag, eftir 16 árum, eru einans 34 skip skrásett undir FAS, og einki er at ivast í, at hetta talið kundi fleirfaldast, um skipanin gjørdist nóg áhugaverd hjá útlendskum reiðaríum, og hon samstundis verður marknaðarførd á rættan hátt.

Spurningurin liggur tó eftir, hvussu verður við teimum føroyingum, sum nú og frameftir fara at sigla við skipum undir FAS-skipanini. Skulu teir koma undir ALS ella ikki, og tað verður ein spurningur, sum greiði skal fáast á, nú skipanin verður endurskoðað.

- Tað verður í høvuðsheitinum spurningurin um at fáa ALS at virka fyri sjófólk, og so spurningurin um hvat vit gera við sjófólk, sum sigla undir FAS, sum skulu greiðast við hesari endurskoðanini av ALS, sigur Johan Dahl, vinnumálaráðharri.

# Senatið atkvøður um bjargingarætlan

**Í kvøld klokkan 19.30 amerikanska tíð – 02.30 føroyska tíð – fer senatið at atkvøða um eitt minni justerað bjargingaruppskot um 700 milliardir dollarar, sum skulu bjarga fíggjarmarknaðinum í USA burtur úr kreppuni**

FÍGGJARKREPPA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Búskaparliga bjargingarætlanin upp á 700 milliardir dollarar – umleið 3.500 milliardir krónur – sum skal hjálpa amerikanska fíggjarmarknaðinum úr kreppuni, kemur til atkvøðugreiðslu í kvøld.

Meirilutaleiðarin hjá demokratunum í senatinum, Harry Reid, fekk í gjár fullan stuðul frá senatorunum at avgreiða týdningarmiklu atkvøðugreiðsluna.

Bæði forsetavalevnini, republikanski John McCain og demokratiski Barack Obama, hava gjørt greitt, at teir fara til Washington at taka lut í týdningarmiklu atkvøðugreiðsluni, sum fer fram klokkan 19.30 lokala tíð.

Ætlanin, sum senatið skal atkvøða um, er ein minni justerað útgáva av uppskotinum, sum fall við atkvøðugreiðsluna í Umboðsmannaráðnum mánadagin. Tað skapti panikk á børsunum og fekk partabrævakursirnar at kava.

Í gjár hækkaðu kursirnir kortini aftur á amerikanska marknaðinum, og tað verður tikið sum eitt tekin um, at íleggjarar hava álit á, at Kongressin hesaferð fer at samtykkja bjargingarætlanina.

Leiðandi politikarar vóna, at ætlanin verður viðtikin við munandi meiriluta í senatinum, so trýstið verður so mikið størri á politikarar í Umboðsmannaráðnum at samtykkja uppskotið, tá teir hittast í morgin, skrivar danska blaðið Børsen.



*Amerikanska senatið fer í nátt at atkvøða um nýggja bjargingarætlan*